## Krevja samleikaprógv

Fólk, sum ferðast við flogfari innanlands í Noregi, skulu nú vísa samleikaprógv, áðrenn tey sleppa umborð á flogfarið. Reglurnar komu í gildi í gjár. Tað er kortini ikki neyðugt at hava passið uppi á sær, tí eftirlitið góðtekur eisini koyrikort ella annað samleikaprógv, sum hevur mynd og føðingardag. Børn, sum ferðast við foreldrunum, nýtast ikki hava samleikaprógv, men ferðast tey einsamøll, skulu tey hava prógv uppi á sær.

## Nøgdir danir

Ein stór evropeisk kanning vísir, at av øllum evropearum eru danir teir, sum eru best nøgdir við sítt arbeiði. Heili 93,4 prosent av teimum spurdu dønunum svaraðu, at teir vóru nøgdir ella sera væl nøgdir við arbeiðið. Men samstundis vísir kanningin, at danir eru teir mest strongdu í Evropa. Í hesum er lítil munur á dønum og øðrum norðurlendingum, men kanningin avdúkar, at danir eru teir einastu, sum eru líka strongdir nú sum í 2005.

Stóratjørn:

# Nógvir fyrispurningar til stjórastarvið

**Tað er ein kvalifiseraður áhugi fyri stjórastarvinum til Stórustjørn verkætlanina. Nógvir fyrispurningar eru komnir, men Anfinn V. Hansen, advokatur, fær ikki sagt, um tey hava fingið nakra ítøkiliga umsókn.**
**– Alt fyri gongur í trúnaði, sigur hann**

STÓRATJØRN
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

23. februar stóð lýsing í bløðunum, har lýst var eftir stjóra til verkætlanina Stórutjørn. Einum stjóra, sum skal hava ábyrgdina av dagligu leiðsluni og samskipa tey ymsu viðurskiftini, meðan byggibúningin og byggingin fer fram.

– Tað er ein kvalifiseraður áhugi, sigur Anfinn V. Hansen, advokatur og formidlari av sambandinum millum umsøkjarar og fólkini handan Stórutjørn verkætlanini.

Hann minnir á, at freistin at søkja ikki er farin enn. Tað er 16. mars kl. 16.00.

– Men higartil hava vit fingið nógvar fyrispurningar, sigur hann.

Anfinn V. Hansen ynskir ikki at svara spurninginum, um teir hava fingið nakra ítøkiliga umsókn frá nøkrum.

– Tað fyrigongur alt í trúnaði, so tað fái eg ikki svara fyri, sigur Anfinn V. Hansen.

Hann leggur so aftrat, at fólk, ið vanliga søkja størv sum hesi, sita ofta í høgum sessum frammanundan. Um hetta so merkir, at tey hava fingið onkra umsókn frá einum persóni, sum í løtuni situr í einum prominentum stjórastarvið, sigur søgan einki um, tí alt fyrigongur í trúnaði, sum Anfinn V. Hansen sigur.

Spurdur um hann fær sagt nakað um, hvørt møguligar umsóknir eru føroyskar ella útlendskar, svarar Anfinn V. Hansen, at eitt av berandi orðunum í allari verkætlanini hjá Jákup á Dul er "føroyskt", og sum skilst á Anfinni V. Hansen, so er hetta eisini galdandi, tá teir nú lýsa eftir stjóra.


*Sambært Anfinn V. Hansen, advokati, er tað ein kvalifiseraður áhugi fyri stjórastarvinum í Stórutjørn verkætlanini hjá Jákup á Dul Jacobsen*

# Stórur meiriluti fyri roykfríum tinghúsið

**Millum 18 og 20 tinglimir hava skrivað undir eina áheitan, um at gera nýggja tinghúsið fullkomiliga roykfrítt.**
**– Vit eiga at vera ein fyrimynd, tá vit samtykkja lógir at galda fyri onnur, sigur Jenis av Rana**

POLITIKKUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Farna hósdag handaði Jenis av Rana løgtingsskrivstovuni eina áheitan. Eina skriv undirskrivað av millum 18 og 20 tingmonnum, sum heita á formansskapin í tinginum, um at geva loyvi til at roykja í nýggja løgtingshúsinum.

– Vit eiga at vera ein fyrimynd, tá vit samtykkja lógir at galda fyri onnur, sigur Jenis av Rana, løgtingslimur,sum handaði løgtingsskrivstovuni skjalið við undirskriftunum á, og einum skrivi sum leggur upp til, at løgtingið eigur at vera ein fyrimynd fyri onnur.



Jenis av Rana minnist ikki tað neyva talið, men sigur, at tað vóru millum 18 og 20 tinglimir, sum skrivaðu undir.

– Eg gekk tvær ferðir runt við skrivinum, og tá vóru ikki øll til staðar, so talið kundi væl verið hægri, metir Jenis av Rana, sum er væl nøgdur við talið av undirskriftum, sum eisini telur nakrar landsstýrismenn.

Spurdur um, hví hann ikki heldur leggur uppskot fyri tingið, um at fáa løgtingshúsið roykfrítt, so svarar Jenis av Rana við at siga, at tað metir hann vera óneyðugt.

– Tað er langt úti, og eigur at vera óneyðugt. Vit royna heldur hetta fyrst, sigur Jenis av Rana, sum nú bíðar spentur eftir, hvat formansskapurin fer at gera við áheitanina.

**Bygginevndin samtykti roykirúm**

Edmund Joensen hevur ikki sjálvur sæð áheitanina frá Jenis av Rana og fleiri øðrum tinglimum, um at fáa tinghúsið fullkomiliga roykfrítt.

– Men hevur formansskapurin fingið eina áheitan, so fara vit sjálvandi at taka hana upp til viðgerðar, sigur Edmund Joensen.

Tá tað er sagt, so minnir løgtingsformaðurin á, at tað er ein breið bygginevnd, umboðandi allar flokkar, sum hevur avgjørt hvussu tingið skal innrættast, og harvið eisini verið við at avgjørt, at eitt roykirúm upp á 20 fermetrar skal vera í nýggja tinghúsinum.

– Venda vit tingunum á høvdið, so kunnu vit siga, at løgtingshúsið er um 3000 fermetrar stórt, og av teimum eru næstan allir roykfríir. Tað eru bara tjúgu fermetrar, sum ikki eru tað, og í so máta hava tey, sum ikki vilja órógvast av royki, ongantíð havt so góðar umstøður sum nú, sigur Edmund Joensen.

Edmund Joensen roknar við, at tað verður á komandi fundi hjá formansskapinum, sum verður í næstum, at áheitanin verður viðgjørd.

# Stormur sunnukvøldið


*- Vindur og regn fyrst í komandi viku, lovar Petur Skeel*

**- Hampiligt veður verður leygardagin, men sunnukvøldið kemur broyting í, sigur veðurmaðurin, Petur Skeel Jacobsen.**

VEÐUR
*Snorri Brend*

Hesar seinastu dagarnar hevur hann ligið við kulda og kava. Men nú verður lýggjari aftur.

Eftir at hava granskað veðurkortini sigur Petur Skeel, at leygardagin verður hampiligt veður og nakað út á sunnudagin.

- Tað verður eisini eitt sindur lýggjari – upp í sjey stig, sigur hann.

Sunnukvøldið verður hinvegin stormur av landsynningi við eini vindferð upp á millum 20 og 25 metrar um sekundið. Tað verður haraftrat regn og upp í eini 8 stig.

Mánadagin minkar hann vindin nakað av landsynningi og suðri. Tað verður uppaftur lýggjari og ælaveður.

Týsdagin og mikudagin verður hvassur vindur við somu ættum, við regni og ælingi.

- Hitin fer at liggja millum 6 og 10 stig, sigur Petur Skeel.